

# Borgarafundur og fólkaatkvøða um samanlegging

**13. mars verður borgarafundur í Nólsoy, og eina viku seinni verður fólkaatkvøða um samanlegging við Tórshavnar kommunu. Jógvan Thomsen, bygdarráðsformaður, dugir ikki at meta um, hvørja støðu nólsoyingar fara at taka til samanlegging, men bygdarráðið er samt um, at hetta er gongda leiðin hjá nólsoyingum**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Eg haldi, at bygdarráðið hevur skyldu til at geva borgarunum í Nólsoy møguleikan at taka støðu til samanlegging við Tórshavnar kommunu, sigur Jógvan Thomsen, bygdarráðsformaður*

Seinastu tíðina hevur nógv verið tosað saman millum umboð fyri Nólsoyar kommunu og Tórshavnar kommunu um samanlegging av kommununum.

Jógvan Thomsen, bygdarráðsformaður í Nólsoy, sigur, at fyrstu fundirnir í hesum arbeiði, vóru á embætismannastigi, sum hann tekur til.

- Eitt forarbeiði varð gjørt, ið legði arbeiði, sum gerast skal frameftir, í fastar karmar, eitt nú við einum fylgiskjali til sáttmála um samanlegging.

Tað vóru bygdarráðsformaður og Jens Marius Poulsen, kommunustjóri í Tórshavnar kommunu, sum løgdu hetta arbeiði til rættis. Fylgiskjalið til høvuðssáttmálan fyllir 28 A4 síður.

Síðan komið varð til tann politiska partin, hevur ein samráðingarbólkur við trimum umboðum úr hvørji kommunu havt fundir um samanleggingina.

### Fólkaatkvøða

Jógvan sigur, at ein høvuðssáttmáli nú er gjørdur, sum fyllir tríggjar A4 síður. Hesin verður væntandi sendur borgarunum í Nólsoyar kommunu nú í vikuskiftinum.

Borgarafundur í Rroyndarhúsinum í Nólsoy, 13. mars, og síðan verður fólkaatkvøða um samanlegging í Nólsoy, 20. mars.

Jógvan Thomsen sigur, at sambært ætlanini, sum fyriliggur, verður Nólsoyar kommuna løgd saman við Tórshavnar kommunu á nýggjárinum, 2005.

Spurdur, hvussu hann metir, at undirtøkan í Nólsoy er fyri samanlegging, sigur hann, at tað dugir hann ikki at meta um.

- Men bygdarráðið stendur púra samt í hesum máli og samtykti einmælt at taka upp samráðingar við Tórshavnar kommunu um samanlegging.

Hann sigur, at tað eru nógv viðurskifti, sum peika tann vegin, at rætt er at fara uppí Tórshavnar kommunu.

- Vit hava eisini verið á fundi við landsstýrismannin í innlendismálum sum sigur, at "koyriætlanin" hjá hesum landsstýrinum er tann sama sum hjá undanfarna landsstýri, nevniliga at vit eiga at hava færri kommunalar eindir, nú politikkurin er, at kommunurnar skulu umsita fleiri og fleiri málsøki.

Jógvan heldur tí, at bygdarráðið hevur skyldu til at geva borgarunum í Nólsoy møguleikan at taka støðu til samanlegging við Tórshavnar kommunu.

### Sáttmálin

- Sáttmálin ber í fyrsta lagi í sær, at vit fáa ein nýggjan barnagarð í Nólsoy til umleið 30 børn. Sum er, er missiónshúsið karmur um barnagarðin, men hesin er meira enn fultsettur nú.

Aftrat hesum, sigur Jógvan, at nøkur smærri arbeiði skulu gerast beinanvegin, sum kosta umleið eina miljón krónur.

- Sambært ætlanini skulu hesi smærri arbeiðini gerast í hesum árinum, og nýggi barnagarðurin skal byggjast í næstu setu, nú kommunuval verður til heystar.

Jógvan vísir á, at umframt tey mál, sum fremjast skulu í hesum árinum og í næstu setu, er avtala gjørd um ávísar langtíðar íløgur.

- Her er talan um útbyggingar av skúlanum, eldraøkinum og liðugtgerð av svimjihylinum, sum stendur í gerð í Nólsoy.

Spurdur, nær hesar íløgur væntandi kunnu gerast, sigur Jógvan:

- Eingin kennur framtíðina, og tað veldst um, hvussu fíggjarvánirnar verða. Gongst væl, koma íløgurnar fyrr, men gongst verri, koma tær seinni.

Hann vísir á, at sáttmálin byggir á solidariskan anda, soleiðis at tíðin kemur borgarunum til góðar, tá ið tað gongst væl og gongst minni væl, mugu borgararnir eisini bera tað.

### Havnarlagið

Spurdur, um Tórshavnar kommuna eisini tekur eina hond í, nú havnalagið í Nólsoy verður útbygt, sigur Jógvan.

- Her eru vit samdir um, at havnaútbyggingar í fyrsta lagi er landsuppgáva, men vit vænta, at vit verða komnir rættiliga langt við tí, sum nú verður gjørt, áðrenn ein møgulig samanlegging verður framd.

Hann sigur, at hesi viðurskifti eru umrødd millum partarnar og tað, sum Jógvan væntar verður eftir at fremja, tá ið samanlagt er, eru møguligar dýpingar av havnini og ferjuskrái.

- Eg trúgvi, at eisini slík viðurskifti verða betur fingin undir land, tá ið vit saman standa sterkari, sigur Jógvan Thomsen.

Í Nólsoy búgva 262 fólk í dag. Nøkur ár herfyri vaks fólkatalið, men nú eru tey færri aftur. Í skúlanum eru 35 børn og á dagstovninum, sum nú er meira enn fultsettur, er talið 22.

Eins og aðrastaðni, har alivinnan hevur verið ein partur av inntøkugrundarlagnum, hava fólk, sum starvast á landalistøðini í Nólsoy, eisini mist arbeiði.

Herfyri læt støðin aftur, sum seinastu árini hevur húsast í bygninginum, sum áður var fiskavirki.

Einir tríggir mans vóru í starvi hjá felagnum, sum hevði alivirksemi í Nólsoy.

Í Nólsoy eru fleiri fiskimenn, og nógv fólk ferðast hvønn dag inn á meginlandið at arbeiða.



*Herfyri læt eisini alistøðin í Nólsoy aftur. Eini trý fólk tjentu til lívsins uppihald á støðini*



# Ikki fleiri túrar til sandoyingar

**Tað sær svart út at fáa Teistan at sigla fleiri túrar til sandoyar, tí peningur er ikki til tað, sum fíggjarstøðan er**

SANDOYARSIGLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Skal Teistin sigla fleiri túrar ímillum Gomlu Rætt og Skopun, skal hann hava eina manning afturat og tað fer at kosta 2-2,5 milliónir og so má okkurt annað skerjast*

**Sandoy:** Tað eru ongi útlit fyri, at Teistin fer at sigla fleiri túrar ímillum Gomlu Rætt og Skopun.

Tað sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum.

Tað var í løgtinginum seinnapartin hósdagin, at Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður, spurdi landsstýrismannin um ætlanin er at lata Teistan sigla ímillum Skopun og Gomlu Rætt longri út á kvøldið.

Bjarni Djurholm svaraði, at longu nú siglur Teistin so nógv sum hann kann við tveimum manningum.

Skal hann sigla meiri, skal hann hava eina manning afturat og tað fer at kosta ímillum 2-2,5 milliónir afturat um árið og hann dugdi ikki at síggja, hvar hann skuldi finna tær, soleiðis sum búskaparliga støðan sær út í løtuni.

– Skal meiri peningur brúkast til sandoyarsiglingina, verður neyðugt at skerja onkra aðrastaðni og hann dugdi ikki at síggja, hvar tað ber til at skerja. talan kann bara vera um at skerja siglingina til Suðuroyar, um Leirvíksfjørð ella til útoyggjarnar og tað dugdi hann ikki at síggja bar til, segði landsstýrismaðurin.

Hann segði, at tað hevði verið umhugsað, at strika onkran túr mitt á degi fyri at kunna sigla onkran túr afturat um kvøldið, men tann ætlanin varð slept, tí tað varð ikki hildið at vera skilagott, hóast tað er nógv bíligari.

– Tað fer serliga at raka farmaflutningin ímillum Sandoynna og meginøkið, helst flutningini av fiski, segði Bjarni Djurholm.

## Kunnandi fundur umbjarging í Klaksvík

**Norðoya Bjargingarfelag skipar fyri kunnandi fundi um bjarging og tilbúgving í Ósáskúlanum**

TILBÚGVING
*Tíðindaskriv*

Í kvøld, fríggjakvøldið 20. februar skipar Norðoya Bjargingarfelag fyri kunnandi fundi um bjarging og tilbúgving í Ósáskúlanum í Klaksvík. Ætlanin er at kunna norðoyingar um ta tilbúgving sum er í Norðoyggjum og geva teimum høvi til at seta spurningar sum viðvíkja trygd, tilbúgving og bjarging.

Framløgur verða sambært skránni niðanfyri, og tær vera umleið 10 minuttir hvør. Eftir hvørja framløgu verður høvi til at seta spurningar. Iris stendur fyri at stýra orðaskiftinum.

**Skráin fyri kvøldið**
Norðoya Bjargingarfelag: Framløga við Bárður Klakstein
At umrøða: Skipanir, útgerð, manning og annað.
Løgreglan: Karl Johansen
At umrøða: Samskipan, tilbúgving og annað.
Klaksvíkar Sjúkrahús: Heri Ellingsgaard
At umrøða: Luturin hjá KS í tilbúgvingini.
Kaffistøðgur 10 min.
Sløkkiliðið: Esmar Klakstein
At umrøða: Hvat kann sløkkiliðið.
Reyði Krossur, sálarlig 1.hjálp: Helen Klein Pætursdóttir
At umrøða: Sálarlig 1. hjálp, hvat er tað.
Sjúkraliðið í Norðoyggjum: Elsba Lützen
At umrøða: Sjúkraliðið í Norðoyggjum
Trygdarmiðstøðin: Dánjal J. Meinertsson
At umrøða: Vitan og tilvitan.

Havandi í huga at várróðurin er byrjaður fer Trygdarmiðstøðin eftir framløgurnar og spurningarnar at blæsa upp ein gummibjargingarbát til fýra persónar, sum er ein vanlig stødd umborð á smábátum. Harafturat verður høvi til at síggja ymiska útgerð sum hevur við trygd og tilbúgving at gera. Eisini verður høvi til at seta fleiri spurningar til umboðini úr panelinum. Tilseinast verða nøkur eintøk av nýggju Føroysku fyrstuhjálparbókini burturluta.

Vónandi møtir nógv fólk til tiltakið.

# Útvarpsstøð á aðra rás

**Rás 2 er nú flutt úr Havn og inn til Søldafirðar**

ÚTVARPSSTØÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Petur Jacobsen setir sendaran til í nýggju hølunum hjá Rás 2 í Søldarfirði*
*Mynd: Jonhard Hammer*

Higartil hevur Rás 2 húsast í leigaðum hølum við Hoyvíksvegin í Havn. Men nú flytir alternativa útvarpsstøðin í egin høli í Søldarfirði.

Tað var tann 14. desember í 1999, at Rás 2 sendi á fyrsta sinni. Tað var Petur Jacobsen, sum saman við øðrum keypti tað, sum eftir var av Atlantic Radio, sum var fyrsta alternativið til Útvarp Føroya.

Síðani hevur Petur Jacobsen ment støðina, sum í dag røkkur 95% av øllum føroyingum.

Tey, ið lurtaðu eftir rásini mikukvøldið varnaðust, at støðin varð sløkt. Hetta var tí, at tey tá fluttu sendaran inn í Søldarfjørð í nýggju hølini – higani støðin nú sendir.

– Í september í fjør keyptu vit egin hús, og higar flyta vit nú alt okkara virksemi, sigur Petur Jacobsen.

Petur Jacobsen og øll hini, ið starvast á støðini, búgva á Skálafjørðinum.

– Tað verður so nógv léttari hjá okkum at arbeiða, nú arbeiðsplássið er nærindis og vit sleppa undan at koyra til Havnar, sigur Petur Jacobsen.

Málið hjá Rás 2 er at røkka allar føroyingar í Føroyum.

# Handilsmaðurin sigur ja til samanlegging

**Gabriel Hansen, sum er handilsmaður í Nólsoy, heldur einki forgjørt verða í, at nólsoyingar nú fáa høvi at atkvøða um samanlegging við Tórshavnar kommunu**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gabriel Hansen heldur, at verður rætt atborið, fer tað at geva nólsoyingum, sum eru fáir í tali, størri møguleikar enn vansar, um lagt verður saman við eini so stórari kommunu, sum Tórshavnar kommuna er.

- Eg veit væl, at tað eru ikki allir kollfirðingar, ei heldur hoyvíkingar, sum eru so fegnir um at vera partur av eini stórari kommunu. Men spurningurin er, hvussu vit, sum eru so fá í tali, skulu kunna rinda fyri allar tær uppgávur, sum eitt nútímans samfelag krevur.

Gabriel heldur, at tað kundi havt sínar fyrimunir, um nólsoyingar vóru partur av eini størri eind.

- Eg trúgvi, at verða vit fleiri um at lyfta, kann okkurt skilagott spyrjast burtur úr, um rætt verður atborið.

Gabriel er sonur Edward, sála, sum í sínari tíð bæði hevði handil og fiskakjallara í Nólsoy.

Hann heldur, at fiskavirkið, sum síðst í sjeytiárunum avloysti fiskakjallararnar í bygdini, í dag kundi verið nýtt til saltfiskavirki, nú fiskur fæst til keyps á uppboðssøluni.

Enn er tó einki frætt um, hvat teir, sum eiga hetta virkið, ætla at brúka tað til, nú alistøðin, sum verið hevur á virkinum seinastu árini, er latin aftur.

### Av bygdini

Handilsmaðurin vísir á, at í Nólsoy eru fá arbeiðspláss, og tí noyðist fólkið av bygdini at vinna sær til lívsins uppihald, um tey skulu verða búgvandi í bygdini.

- Rytan siglir við nógvum fólki, sum fer til arbeiðis og í skúla hvønn dag. Tey, sum eiga børn, skulu hava børn síni ansaði, meðan tey eru av bygdini til arbeiðis.

- Sum eg havi skilt, sigur Gabriel, er ein partur av sáttmálanum millum Nólsoyar kommunu og Tórshavnar kommunu, at eitt nú nýggjur barnagarður skal byggjast í Nólsoy í næstum.

Handilsmaðurin heldur, at soleiðis sum tíðin er vorðin, og krøvini eru økt, er hann fyri, at Nólsoyar kommuna fer uppí Tórshavnar kommunu.

- Ivaleyst eru onkrir vansar við samanlegging, men eg dugi eisini at síggja, at her eru nakrir eygsýndir fyrimunir, sum eg haldi telja meira, tá ið saman um kemur, sigur Gabriel Hansen at enda.